**Býráðsfundur mikudagin 29. september 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

| | **Fundarskrá:** | **Fundarsamtykt:** |
|---|---|---|
| **1.** | **10/00408**<br>**Upptøkureglar til stovnar á dagstovnaøkinum í Eysturkommunu**<br>Trivnaðarnevndin mælir til at taka undir við upptøkureglunum til ansingarstovnar í Eysturkommunu við smávegis broytingum. | Einmælt samtykt at beina málið aftur í trivnaðarnevndina. |
| **2.** | **10/00371**<br>**Samanlegging av bókasøvnunum í Gøtu og Leirvík**<br>Uppskot um navn til bókasavnið í Eysturkommunu, nú Eysturkommunu býráð á fundi tann 31. august 2010, einmælt samtykti at leggja bókasøvnini í Gøtu og Leirvík saman til eitt fólkabókasavn.<br><br>Trivnaðarnevndin mælir til at nýggja navnið á samanløgdu bókasøvninum verður Eysturkommunu Bókasavn | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini. |
| **3.** | **10/00341**<br>**Kæra viðvíkjandi garði á matr. 21 í Syðrugøtu**<br>Í sambandi við ætlanina at gera garð uttanum Valhøll í Syðrugøtu kærdi eigarin av matr. nr. 21 ætlanini. Á byráðsfundindi tann 30. august bleiv samtykt at royna at fáa semju við eigaran um málið og er hetta nú gjørt. | Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi semju. |
| **4.** | **10/00320**<br>**Umsókn um at seta upp eitt parabolnet**<br>Poul Henning Jacobsen, ið eigur matr. nr. 215m á Gerðavegi hevur sent umsókn at gera eitt parabol net, har 3 parabolskermar skulu setast upp á fríðøkið (øki F er frítíðarøki) omanfyri matr. nr. 215o (Heidi og Jan Heinesen).<br><br>Ásetingarnar fyri **frítíðarøkið F** eru:<br>Økið verður lagt av til ítróttarvallir, spælipláss, útiverupláss o.t. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |

**Býráðsfundur mikudagin 29. september 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

Innan fyri økini mugu bara verða gjørd virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarandi økispørtum og tí tænastuvirksemi, ið hevur samband við tey.

Hús kunnu bara verða bygd eftir byggiætlan, sum býráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað størri økið.

**À fundi tann 18. August 2010 mælti tekniska nevnd frá at geva loyvið til at seta upp parabol, við tí grundgeving at økið er lagt út sum frítíðarøki F, ið er øki sum er lagt út til ítróttarvallir, spælipláss, útiverður o.t.**

Á býráðsfundinum tann 30.08.2010 var einmælt samtykt, at beina málið aftur í teknisku nevnd.

Tekniska nevnd viðgjørdi málið av nýggjum á fundi tann 17. september og samtykti at mæla til at geva loyvið at seta upp parabolnet í Syðrugøtu við treytunum sum eru viðmerktar í notatinum frá teknsiku umstingini.

**5. 10/00370 og 09/00635**
**Umsókn frá Absalon Absalonsen um at útseta byggifreistina**
Absalon er umborð á Logos Hope og verður ikki aftur í Føroyum fyrr enn summari 2011. Absalon hevur undirskrivað skeytið tann 11.02.2010, t.v.s. at byggiarbeiðið skal verða byrja innan 11.02.2011 og sethúsini skulu verða innilokaði innan 11.02.2012.

Tekniska nevnd hevur samtykt at útseta byggiloyvið við 6 mánaðum í mun til skeytið.

Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Terji Lervig
Jan E. Petersen
Tollakur Joensen
Elin V. Olsen
Fríðgerð Heinesen
Hans Mourits Foldbo

**Atkvøddi ímóti:**
Joen Magnus Rasmussen, við tí grundgeving at málið er avgreitt í teknisku nevnd.

**Býráðsfundur mikudagin 29. september 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**6. 10/00410**

**Ljóðkanningar í Fríðtíðarheiminum í Leirvík og umvæling**

Í samband við at fyrrverandi kommunuskrivstovan í Leirvík er tikin í nýtslu sum fríðtíðarheim er staðfest, at akustikkurin og eftirklangstíðin á stovninum er út av lagið vánalig (sí hjáløgdu frágreiðing og mátingar sum eru gjørdar).

Tekniska umsitingin hevur kanna prísirnar fyri at gera ábøtur ið lúka krøvini sambært frágreiðingini frá Steingrund Akustik, og er kostnaðurin 123.120.00 kr. uttan mvg ið søkt verður um til hetta arbeiðið.

Tekniska nevnd mælir til at gerða gerða arbeiðið. Peningurin verður tikin av konto 4.23.22.511 (íløga til skúlan)

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**7. 10/00416**

**Bingjupláss í Eysturkommunu**

Umsitingin hevur tosa um ymiskar møguleikar viðv. bingjuplássunum og tíðirnar nær í hesar skulu hava opið.

Uppskot er m.a. um;

- At bingjuplássini hava opið somu tíðir, t.v.s. týsd. og hósd. frá 16-18 og leygardag frá 9-12.
- At bingjuplássini hava opið ymiskar tíðir, t.v.s. í Leirvík mánad. og mikud. kl. 16-18, og í Gøtu týsd. og hósd. 16-18, og leygardag kl. 10-14 (møguliga bara annað bingjuplássið).
- At tað verður eitt bingjupláss í Eysturkommunu.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Býráðsfundur mikudagin 29. september 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

Tekniska nevnd mælir til at bingjuplássini verða opin soleiðis:

Í Gøtu mánadag og mikudag kl. 17.00 til 19.00 og leygardag 10.00 til 13.00
Í Leirvík týsdag og hósdag kl. 17.00 til 19.00 og leygardag 10.00 til 13.00.

Fíggjarnevndin mælir til at bingjuplássini í Eysturkommunu verða opin hvønn gerandisdag frá 16.00 til 18.00.

Í Leirvík mándag, mikudag og fríggjadag.
Í Gøtu týsdag, hósdag og leygardag.

**8. 09/00254**

**Býarætlan fyri Eysturkommunu**

Eysturkommuna hevur fingið tilboð upp á liðugtgerð av Býarætlanini. Tilboðið ið er á kr. 293.475,00 kr. uttan mvg fevnir um korttilfar, tekstur, býaratlas, fortreytir og visiónir.

Umframt Býarætlanina skal byggisamtyktgerðast samsvarandi býarætlanini, og er kostnaðurin fyri hetta arbeiðið mettur til kr. 293.475,00. Selmar Nielsen metir at verður arbeiði gjørt upp á tímaløn er taksturin um 600-700 kr. um tíman + mvg.

Tekniska nevnd mælir til at gerða býarætlanina og byggisamtyktini í ár, og atpeningurin konto 6.22.11.510 (Byggibúning)

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**9. 10/00420**

**Fótbóltsvøllurin í Leirvík**

Eysturkommuna hevur fingið tilboð frá IDÉ Møblum upp á kr. 515.000,00 kr. uttan mvg at umvæla og festa vøllin í Leirvík. Staðfest er, at vøllurin fleiri ferðir hevur fingið skaða og er í

Samtykt at útseta málið til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur mikudagin 29. september 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

ringum standi, eisini skal nevnast at Tryggingin hevur viðmerkt, at skaðarnir eru nógvir og kostnaðamiklir, og at kommunan hevur skyldu til at fyribyrgja afturvendandi skaðum.

IDÉ Møblar hevur somuleiðis sent kommununi tilboð upp á nýggan/ar vallir í Leirvík og í Gøtu við ávísum treytum og viðlíkahald.

Tekniska nevnd mælir til at málið verður viðgjørt í samband við fíggjarætlanina fyri 2011, og at verandi vallir í Leirvík og í Gøtu eisini verða umrøddir.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd. Spurningurin um gjald/endurgjald eigur at verða tikin upp við IDE-møblar.

**10.** **10/00163**

**Góðkenning av fíggarætlan fyri bókasavnið í Eysturkommunu 2011.**
Trivnaðarnevndin mælir til at taka undir við fíggjarætlan 2011 fyri bókasavnið í Eysturkommunu

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarnevndini.

Einmælt samtykt at taka udir við tilmælinum frá trivnaðarnevndini.

**11.** **10/00399**

**Umsókn, frá Víkingi, um stuðul 2011**
Trivnaðarnevndin mælir til at málið verður tikið upp á fyrst komandi býráðsfundi

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá tivnaðarnevndini.

Einmælt samtykt at taka málið upp til viðgerðar í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2011.

*Erik Lervig var úti undir viðgerðini*

**12.** **10/00377**

**2.viðgerð av eykajáttan til íløgu í frítíðarheimið (gomlu kommunuskrivstovuna í Leirvík) á kr. 250.000,00**
Fíggjarnevndin mælir til at hækkað eykajáttanina

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mikudagin 29. september 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

til 380.000,00 kr. í sambandi við at arbeiðið við at betra um ljóðviðurskiftini eisini verður gjørt (sí mál. nr. 5)

Peningurin verður tikin av konto 4.23.22.511 (íløgu í skúlan)

**13.** **10/00407**
**1.viðgerð av eykajáttan til stuðlar**
Játtanin á fíggjarætlanini fyri 2010 viðv. børnum við serligum tørvi, heldur ikki.

Trivnaðarnevndin mælir til eykajáttan á kr. 250.000,00

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarnevndini.

100.000,00 kr. verða tiknar av konto 2.21.31.511. (barnavernd) og rest 150.000,00 kr. verða tiknar av innistandandi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

**14.** **10/00433**
**1.viðgerð av eykajáttanum í samband við gjøgnumgongd av fíggjarætlanini fyri 2010**
Í sambandi við gjøgnumgongdina av fíggjarætlanini fyri 2010, mælir fíggjarnevndin til hesar eykajáttanir

1. 75.000,00 kr. til konto 1.11.11.510 (Samsýningar til kommunustýrislimir) frá konto 5.24.13.510 (Vinarbýarsamstarv)
2. 200.000,00 kr. til konto .220.22.510 (Kommunulæknaútreiðslur). Peningurin verður tikin av innistandandi

Samtykt at taka undir við tilmælinum

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Joen Magnus Rasmussen
Jan E. Petersen
Tollakur Joensen
Elin V. Olsen
Fríðgerð Heinesen
Hans Mourits Foldbo

**Atkvøddi ímóti:**
Terji Lervig, við tí grundgeving at peningurin til punkt nr. 8 er brúktur í heimildarloysi.

**Býráðsfundur mikudagin 29. september 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

3. 30.000,00 kr. til konto 5.24.13.510 (Lávusarhús) frá konto 5.24.14.510 (Stuðul til mentan)
4. 80.000,00 kr. flytast millum Ítróttarøki og Ítróttarhøllina á Kambsdali (hetta er sama høvuðskonto so her er ikki neyðugt við eykajáttan)
5. 70.000,00 kr. til konto 6.24.51.510 (Kirkjugarðar) frá konto 6.22.11.510 (Byggibúning)
6. 200.000,00 kr. til konto 6.38.12.510 (Gøtuljós) frá konto 6.22.11.510 (Byggibúning)
7. 130.000,00 kr. til konto 2.21.61.510 (Eldrarøkt). Peningurin verður tikin av innistandandi.
8. 230.000,00 kr. til konto 6.11.32.511 (fríðkan av kommununi) frá konto 6.22.11.510 (Byggibúning)
9. Hækkan av inntøku við kr. 300.000,00 av leigu á konto 7.38.14.510 (Havnir og lendingar)

**15.** **10/00432**
**Fíggjarætlan fyri 2011**
Einmælt samtykt at leggja fram fyriliggjandi uppskot við einum avlopi á kr. 859.000,00 kr aftaná rentur og avdráttir.

Skattaprosentið verður óbroytt 22%

Einmælt samtykt at beina málið í føstu nevndirnar til víðari viðgerð.

**Býráðsfundur mikudagin 29. september 2010 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Elin Vatnhamar Olsen, Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen, og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi**: Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**16. 10/00000**
**1.viðgerð av eykajáttan til keyp at matr. nr 23 við ástandandi hoyggjhúsið í Syðrugøtu**

Einmælt samtykt at játtað kr. 150.000,00.

Peningurin verður tikin av 6.22.11.510 (Byggibúning)

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Terji Lervig ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________

Joen Magnus Rasmussen ______________________________

Fríðgerð Heinesen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Elin V. Olsen ______________________________